# Frálík pisakanning!

SJÚRÐUR SKAALE



**Tað tabu, sum leingi hevur verið um okkara niðursmokkaðu skúlaskipan, er endiliga brotið. Pisakanningin má gerast startskotið til endurreising**

Í juni 2001, tá eg starvaðist á Fregnum, hoyrdi eg so nógvar søgur um óskil á Læraraskúlanum, at eg setti mær fyri at kanna tað nærri.

Eg tosaði við nógvar næmingar, og tað, teir søgdu, var einki minni enn skelkandi.

Formaðurin, næstformaðurin og skrivarin í Ráði teirra lesandi á skúlanum vóru so djarvir, at teir stóðu fram í blaðnum. Tveir teirra lærdu til pedagog og ein til lærara. Men tað, teir høvdu at siga, var fyri mesta partin tað sama.

Ta yvirskipaðu upplivingina hjá einum næmingi á skúlanum, lýsti ein teirra soleiðis:

“Hvørt ár koma nýggir næmingar inn á skúlan. Teir eru fullir av eldhuga. Vilja læra nakað nýtt og eru sinnaðir at arbeiða. Men sum fyrsta árið á skúlanum líður, sovnar tann upprunaligi eldhugin burtur. Alt steðgar upp og køvist. Skúlin, sum skuldi birt upp undir áhugan, køvir hann í staðin.”

Og úrslitið gjørdist sambært næminginum hetta:

”Tá næmingarnir hava verið nóg leingi á skúlanum, er allur eldhugi burtur hjá mongum. Hugsanin er, at tú bara skalt vera innskrivaður á skúlanum í fýra ár. Tá tey eru farin, fært tú prógv. Og tað er líka mikið, um tú hevur lagt nógv ella lítið arbeiði í tína útbúgving.”

Næmingarnir greiddu eisini frá, at tað so at siga ikki var nøkur leiðsla á skúlanum yvirhøvur. Teir fingu eina kenslu av, at eingin hevði ábyrgdina av nøkrum. Og tann kenslan styrktist av, at stjórin ein stóran part av tíðini als ikki var til staðar. Hvørki á skúlanum – ella í landinum...

Í fleiri lærugreinum var støðið júst tað sama sum tað er á miðnámsskúlunum. At ganga á læraraskúlan, søgdu næmingarnir, kendist ofta sum at ganga umaftur í miðnámsskúla. Ja, stundum kendist tað sum at ganga umaftur í fólkaskúla...

Tann lógarkravda skyldan at møta upp til undirvísingina bleiv als ikki vird, og næmingarnir høvdu enntá upplivað, at lærarar, orsaka av vánaligari tilrættislegging, ikki møttu upp til próvtøku.

Næmingarnir fóru so langt at teir í fyrsta lagi kravdu, at leiðslan á skúlanum varð skift út, og í øðrum lagi at myndugleikarnir gjørdu sær greitt, hvat endamálið var við hesum skúla, sum var endaður í reinum kaos.

### Heilur flokkur stuðlar

Táverandi rektari á skúlanum hevði onga viðmerking, tá eg legði hetta fram fyri hann. Men tveir dagar seinni sópaði hann í einum lesarabrævið allar ákærur av borðinum, legði ábyrgdina fyri mistrivnaðin á næmingarnar sjálvar, og rættvísgjørdi sín egna leiklut við at vísa til ógvuliga flákrandi hugsanir um pedagogiska filosofi.

Hann skrivaði eisini at tað, sum hevði staðið í Fregnum "fær í hvussu er fólk, ið ikki vita betur, at halda, at øll lesandi á læraraskúlanum standa saman um tað, sum teir siga.

Tað passar ikki".

Hetta arroganta svar fekk rættiliga øði í nógvar næmingar, og tí gjørdi ein heilur flokkur av pedagognæmingum av alment at geva teimum, sum høvdu sett ákærurnar fram, sín fulla stuðul.

### Larmandi tøgn

Men eingin annar stuðlaði næmingunum!

Vaksnir næmingar seta ikki so álvarsamar ákærur fram til stuttleika. Hetta var einki minni enn eitt neyðarróp. Men kortini hendi einki. Myndugleikarnir lótu ikki við seg koma, og almennu fjølmiðlarnir tóku ikki málið upp. Nøkur lesarabrøv seinni seyraði neyðarrópið hjá hesum djørvu næmingum niður í tann sandin av hugsjónar- og dirvisloysi, sum okkara almenna skúlaverk hevur staðið á í mong ár.

Tann sandin, sum eisini er fullur av ringu samvitskuni hjá teimum túsundtals føroyingum, sum í mong ár hava vitað hvussu støðan er innan okkara skúlaskipan, og sum hava tosað um tað sínámillum, men sum ikki hava torað at tala eitt orð um tað alment.

### Frálík pisakanning

Henda fýra ára gamla søgan er eitt dømi um tað óhugnaliga tabu, sum hevur verið kring alt skúlakjak í Føroyum í mong ár. Sjálvt ikki tá røddirnar vóru so harðar sum her, tordi nakar at svara. Og tíansheldur gera nakað.

Hevði pisakanningin fortalt okkum, at okkara fólkaskúli er vánaligur, men at onkur annar fólkaskúli er verri, hevði hennara lagna helst verið tann sama. Hon hevði verði køvd í undanførslum og tosi um pedagogikk, form, trivnað osv.

Men hetta úrslitið kann ikki burturforklárast. Her er yvirhøvur eingin ivi; den er gruelig gal! Niðurstøðan er so greið, at eingin undanførsla er før fyri at káva útyvir hana.

Tíbetur!

Tí við einum so greiðum úrslitið, er nógv lættari at fara til verka. Øll vita, at vend má koma í. Øll vita eisini, at eitt so vánaligt úrslit ikki kann kastast nøkrum einstøkum parti fyri. Bæði myndugleikar, skúlaleiðslur, læraraskúli, lærarar og – kanska serliga – foreldur, kenna sína skyldu.

Tí eru fortreytirnar nú so góðar sum ongantíð áður at savna fólk um at fáa ta skútuna á rættkjøl, sum hevur tikið sjógv í nógv Harrans ár.

Frálík pisakanning!

# Barnaansing contra summarfrí og arbeiði

GITTE N. FJALLSBAK

Summarið nærkast, og vit foreldur vilja sjálvandi hava summarfrí saman við okkara børnum. Nú skulu vit rættiliga hugna okkum saman. Trupulleikin er, at nógvir barnagarðar og nógvar vøggustovur stongja í summarfrítíðini. Arbeiðsgevarin og samstarvsfelagar vilja, at man skal leggja feriuna tilrættis. Jú, tað er onki problem. Eg skal hava frí í viku 29, 30 og 31, tí tá er stovnurin, har míni børn eru, stongdur. Ja men tað vilja vit eisini, siga fleiri starvsfelagar, tí tá er stovnurin, har míni børn eru, eisini stongdur. So standa vit har. Øll vilja hava frí samstundis.

Kommunan bjóðar tó annað ansingarpláss hesar vikurnar. Hetta er á einum fremmandum stovni, har foreldur og børn ikki kunnu vera vís í, at ein vaksin frá tí vøggustovu ella barnagarði, har børnini ganga, fylgir við. Tá koma okkara børn á ein fremmandan stovn, har starvsfólk, sum barnið kanska ikki hevur møtt fyrr, skal ansa eftir barninum allan dagin. Tað eru nøkur foreldur, sum taka av tilboðnum frá kommununi, onnur býta feriuna sundur, har mamman er heima helvtina og pápin hina helvtina, soleiðis at børnini hava frí í 4 til 6 vikur. Eru hesar loysnirnar tær bestu at bjóða børnunum? Hetta skal als ikki skiljast sum nakar kritikkur til tey, sum ansa eftir børnunum. Hetta er bara ein fyrispurningur. Fái meg illa at trúgva, at hetta er tað besta, kommunan hevur at bjoða teimum yngstu borgarunum í samfelagnum.

Kommunan skal spara, er grundgevingin eg havi hoyrt. Tað kundi verið áhugavert at kanna, hvussu nógvan pening kommunan sparir við at stongja stovnarnar. Eg meini ikki, at tað er rætt at stongja ein so týdningarmiklan part av samfelagnum, í tríggjar vikur - hvørt ár. Fáa vit nóg nógv fyri pengarnar - ella gjalda vit ov lítið? Ikki tí, eg meini sjálv at gjaldið er nóg høgt longu nú, men eg vil heldur gjalda meira og fáa tað besta, heldur enn at gjalda ov lítið, og ikki fáa tann kvalitetin, eg ynski fyri míni børn.

At summi børn onga summarfrítíð hava, uttan so at ansingarstovnurin stongir, er onnur grundgeving, eg ofta havi hoyrt. Tað er sjálvandi ikki gott, men er tað tá ikki betur, at tey børnini eru á stovni, har tey fáa ta umsorgan, teimum vantar heima? Tað munnu tó ikki vera nógv børn, sum ikki fáa frí um summarið. Tað munnu heldur ikki vera nógv foreldur, sum ikki vilja halda summarfrí saman við børnunum. Tað er sera óheppið, at tað gongur út yvir tey foreldur, sum heldur enn gjarna vilja hava frí saman við børnunum, men kanska ikki hava møguleikan júst í viku 29, 30 og 31.

Tað kundi verið áhugavert at fingið eitt alment kjak um hetta evni. Tað tykist sum um øll eru nøgd og væl foreint við hesa skipan. Góðu foreldur og onnur, sum hava nakað uppá hjarta. Sigið hvat tit meina um hetta. Tað kann ikki vera rætt, at onki kann gerast!

# Løgtingið vrakaði uppraðfestingar í skúlanum

HEIDI PETERSEN
løgtingskvinna



**11. mai kunnger landsstýrismaðurin í mentamálum skelkandi úrslit frá PISA undankanning, meðan uppskot til samtyktar frá Tjóðveldisflokkinum, sum Heidi Petersen, løgtingskvinna legði fram um m. a. styrkjan av fakliga førleikanum í fólkaskúlanum ikki vann frama**

Føroyingar hava síðan 1. januar 2002 havt fulla ábyrgd av undirvísingarverkinum, og vit hava sostatt átikið okkum endaliga ábyrgd av, at førleikarnir hjá okkara næmingum eru so góðir, at vit kunnu samanbera okkum við onnur framkomin lond, og at okkara ungdómar eru eins væl fyri í altjóða høpi, sum ungdómar úr øðrum londum eru.

Sum ein uppfylging av hesum tók Tjóðveldisflokkurin í Mentamálaráðnum í 2003 avgerð um, at Føroyar skuldu luttaka í altjóða PISA kanningini av fólkaskúlanum. PISA-kanningarnar, sum OECD stílar fyri, hava víst seg at verið eitt gott amboð at nýta í skúlaverkinum í teimum ymsu londunum, tá ið metast skal um førleika og úrtøku hjá 15 ára gomlum næmingum í 9. flokki.

Orsøkirnar fyri luttøku vóru fleiri, men ein av høvuðsorsøkunum var at kanningarnar kundu staðfesta á hvørjum støði føroyski fólkaskúlin var á í mun til fólkaskúlarnar í øðrum londum, og við kanningarúrslitinum sum grundarlag, kundu tryggja føroyskum fólkaskúlanæmingum eins góða og holla útbúgving, sum næmingar í øðrum londum fáa.

Nú úrslitini av undankanningini fyriliggja, ásannar Tjóðveldisflokkurin, at tey eiga at takast í størsta álvara, og heldur tað vera bráðneyðugt at fara undir eina gjølliga endurskoðan av øllum fólkaskúlanum sum skjótast. Kanningin vísir, at fakliga støðið í føroyska fólkaskúlanum á ongan hátt er nøktandi, og við hesi staðfesting verður neyðugt at fara álvarsliga til verka í endurskoðanini av skúlanum.

Tjóðveldisflokkurin heldur tíðina vera komna til at skipa ein fólkaskúla við støði í føroyskum viðurskiftum, samfelagið, mentan og samleika, og samstundis ein fólkaskúla við sterkum fakligum innihaldi, sum ger næmingar okkara førar fyri at stíga fram og kappast á jøvnum føti við næmingar úr øllum heiminum.

Tjóðveldisflokkurin legði 3. mars í ár uppskot til samtyktar fyri Føroya Løgting við áheitan á landsstýrismannin í mentamálum um at kannað, hvussu vit í føroyska fólkaskúlanum kundu uppraðfesta nøkur øki, soleiðis at vit longu á fíggjarlógini fyri 2007 kundu játtað neyðug framtøk á fólkaskúlaøkinum innan:

- føroyskt mál og mentan,
- skapandi lærugreinir og samstarvi millum næmingarnar,
- fjøltáttaðum arbeiðshættum og tøkni, so fakligi førleikin kann styrkjast og liva upp til altjóða krøv,
- sernámsfrøðiligu ráðgevingina og undirvísingina kring landið.

Umráðandi er, at føroyskir fólkaskúlanæmingar fáa gott í beinið, so hvørt sum heimurin við nýggjari tøkni og samskiftismiðlum, ferðasambondum og margfølduм møguleikum gerst minni og minni fyri hvønn dag, sum gongur.

Hetta gerst best við hollari upplæring og undirvísing í máli og mentan, har stórur dentur skal leggjast á landsins søgu og siðir, tí hesi eru sjálvt grundarlagið undir einum sjálvstøðugum og sterkum samleika í føroyska fólkinum.

Nútímansgerð av lærugreinum og arbeiðshættir eiga at vera verkevni, sum støðugt skal arbeiðast við í føroyska fólkaskúlanum. Málið eigur greitt at vera at styrkja um fakliga førleikan, so hann lýkur altjóða krøv og harvið ger okkum betur brynjaði til kappingina á altjóða pallinum.

Løgtingið helt ikki, at so átrokandi neyðugt var at gera uppraðfestingar í fólkaskúlanum og 20. apríl var uppskotið felt við 18 atkvøðum ímóti og 10 atkvøðum fyri. Nú niðurstøðan frá undankanningini í fólkaskúlanum fyriliggur, er tað mín vón, at eisini Føroya Løgting dugir at síggja álvaran í málinum, og vil vera við til at taka ábyrgd.

Altjóða kappingin gerst ikki umvegis annað land, men einans beinleiðis, og tí muga vit vilja, tora og hava dirvi í felag at seta okkum mál og taka avgerðir, so at eisini okkara ungdómar í framtíðini kunnu teljast millum heimsins fremstu.

Tí verður neyðugt at vit øll í felag fara til verka at lyfta uppgávuna, og tað eigur at gerast nú.

Næmingar, foreldur, skúlastýrið, lærarar, kommunur, lærarafelag, fyrisiting, læraraútbúgvingin, landsstýrismaðurin í mentamálum, politisku flokkarnir og allar góðar kreftir í føroyska samfelagnum, sum kunnu vera við, skulu samfelt vilja og tora at taka ábyrgd av føroyska fólkaskúlanum.